## Nýggjur landsliðsspælari

20 ára gamli miðverjin Michael Mancienne er tikin út til enska landsliðið. Spælarin er sáttmálabundin við Chelsea, men har standa stjørnurnar í kø fyri at spæla, so Mancienne hevur verið leigaður til Wolverhampton. Har hevur hann spælt so væl, at Fabio Capello hevur tikið hann út til venjingardystin hjá Onglandi ímóti Týsklandi mikukvøldið.



## Chelsea við hava Ezequiel

Álopsspælarin Ezequiel Lavezzi er eitt av stóru nøvnunum í italskum fótbólti í løtuni. 23 ára gamli argentinarin hevur skorað nógv mál fyri Napoli, og nú eru fleiri onnur feløg áhugað í honum. Eitt av feløgum, sum vil keypa Ezequiel, er Chelsea. Tað sigur álopsspælarin í hvussu er sjálvur við italskar fjølmiðlar.

# Toppskjúttin heldur toppliðnum í toppinum

**Tvey mál leygardagin. Átta mál í fýra teimum seinastu dystunum, og tilsamans 12 mál í 12 dystum. Nicolas Anelka er maðurin, ið heldur Chelsea á fremstu rók í Premier League**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hann er flúgvandi í løtuni. Tað hevur heldur ongantíð verið nakar ivi um, at Nicolas Anelka er ein framúrskarandi áleypari. Hetta hevur hann prógvað ferð eftir ferð. Í Paris St-Germain, Arsenal, Real Madrid, Paris St-Germain einaferð aftrat, Liverpool, Manchester City, Fenerbaçhe, Bolton, Chelsea og á landsliðnum.

Men mongu feløgini vitna eisini um, at 29 ára gamli franskmaðurin hevur havt trupult við at finna seg til rættis har, hann hevur verið. Persónligir trupulleikar av alskyns slag hava merkt yrkisleiðina hjá »Enfant terrible«, sum hann eisini verður kallaður. Men uttan mun trupulleikar uttan fyri vøllin, so hevur Anelka so at siga altíð verið garantur fyri mál. Av somu orsøk hevur tað ongantíð verið nakar trupulleiki hjá honum at finna eitt felag – og feløgini hava altíð verið sinna at knýtt Anelka at hópinum, eisini hóast hann bar orð fyri at verið eitt sokallað problembarn. Tískil er Anelka eisini tann leikarin, ið feløg hava brúkt flest pengar upp á gjøgnum tíðina. Tilsamans 860 milliónir krónur hava omanfyrinevndu feløg brúkt upp á Anelka!

Nú er hann so av álvara við at prógva, hví Chelsea valdi at brúka 150 milliónir krónur uppá hann í januar í ár. Størsta stjørnan í Chelsea, Didier Drogba, hevur verið nógv skaddur í ár, og tí hevur av álvara verið brúk fyri Anelka. Franskmaðurin hevur teir 12 dystirnar, hann hevur spælt í Premier League í ár, eisini víst, at hann ikki bara kann, men skal brúkast.

Toppskjúttin í Premier League er tó ikki úttikin til franska landsliðið, sum skal spæla ímóti Belgia mikudagin. Tað vísir enn einaferð, at tað eru viðurskifti uttanfyri vøllin, ið er trupulleikin hjá Anelka.

### Toppur vann á botni

Tvey av teimum 12 málunum, Anelka hevur gjørt í Premier League higartil, gjørdi hann um vikuskiftið, tá Chelsea á útivølli basti West Bromwich 0-3. Fyrsta málið í dystinum gjørdi Bosingwa. Ein tryggur sigur á botnliðnum, og harvið vann Chelsea sín tíggjunda útivallarsigur á rað – tað hevði bara Tottenham megnað frammanundan, hetta fyri 47 árum síðani. Ein staðfesting av, at bæði toppliðið og toppskjúttin í Premier League eru vælkoyrandi í løtuni.

### Liverpool aftur á sigurskós

Hitt liðið við 32 stigum er Liverpool. Teir reyðu hava tapt tveir dystir á rað fyri Tottenham, annan í Premier League og hin í Carling Cup. Leygardagin komu teir aftur á beint, tá teir vunnu 0-2 á Bolton við málum frá Kuyt og Gerrard.

Hóast fleirtaldar møguleikar fyri at økja um leiðsluna, kom Liverpool undir eitt ávíst trýst í seinna hálvleiki, men tað eydnaðist monnunum hjá Benitez at koyra tíggjunda sigurin í ár heim, og harvið hava teir eins nógv stig og Chelsea.

### Ronaldo komin fyri seg

Ein annar leikari, sum eisini hevur víst stórspæl síðstu dystirnar, er Ronaldo hjá Manchester United. Maðurin byrjaði kappingarárið varliga, eftir eina skurðviðgerð í summarfrítíðini, men hevur seinastu tíðina víst nakað av somu taktum frá farna kappingarári. Leygardagin staðfesti hann so av álvara, at hann er við at finna stórformin aftur, tá hann tvær ferðir sendi beinleiðis fríspark í netið. Hetta var í 5-0 sigrinum á Stoke, har Carrick, Berbatov og bara 17 ára gamli Welbeck gjørdu hini málini.

### Arsenal og Tottenham steðgað

Arsenal hevur eisini fleiri ungar mans á sínum liði. Leygardagin taptu hesir fyri Aston Villa. Dysturin endaði 0-2 og var tað eitt sjálvmál og eitt mál frá Agbonlahor, ið tryggjaðu Aston Villa trý stig, ið hava við sær, at liðið úr Birmingham hevur eins nógv stig og Arsenal.

Arsenal var ikki einasta Londonliðið, ið tapti um vikuskiftið. Tottenham hevur ikki tapt síðani Harry Redknapp tók yvir eftir Juande Ramos. Ein javnleikur og fýra sigrar í Premier League, UEFA Cup og Carling Cup var úrslitið undan vikuskiftinum, har tað eydnaðist Fulham at koppa Tottenham. Davies og Johnson gjørdu málini hjá Fulham, meðan Campbell skoraði fyri Tottenham, sum harvið ikki megnaði at hála seg úr botninum, har tað er ógvuliga tætt. So tætt, at Sunderland við sínum sigri háløði upp á eitt 11. pláss eftir at hava ligið undir niðurflytingarmarkinum undan vikuskiftinum.



*Í Bretlandi verður í hesum døgum tosað um, at Anelka í løtuni vísir somu dygdir, sum hann gjørdi í kappingarárinum 1998-1999, tá Anelka umboðaði Arsenal*

*Mynd: Polfoto*

### Støðan:

1 Chelsea 32
2 Liverpool 32
3 Manchester United 24
4 Arsenal 23
5 Aston Villa 23
6 Hull 21
7 Everton 19
8 Middlesbrough 18
9 Portsmouth 18
10 Fulham 17
11 Sunderland 15
12 Manchester City 14
13 Bolton 14
14 West Ham 14
15 Stoke 14
16 Wigan 13
17 Newcastle 13
18 Blackburn 13
19 Tottenham 12
20 West Bromwich 11

### Úrslitini um vikuskiftini:

16/11 Hull - Manchester City 2-2
16/11 Everton - Middlesbrough 1-1
15/11 West Bromwich - Chelsea 0-3
15/11 Manchester United - Stoke 5-0
15/11 Arsenal - Aston Villa 0-2
15/11 West Ham - Portsmouth 0-0
15/11 Newcastle - Wigan 2-2
15/11 Blackburn - Sunderland 1-2
15/11 Fulham - Tottenham 2-1
15/11 Bolton - Liverpool 0-2